tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 30.03.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Signar Dam

Ikki møtt: Súsanna Bertholdsen, fráboðað

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
| --- | --- | --- |
| **Til støðutakan** | | |
| 19/23 | 22/00199-4 | SALT -Val av stýrislimi í Saltsilogrunnin 2022 |
| 20/23 | 23/00079-1 | Kommunusamanlegging -arbeiðsbólkurin |
| 21/23 | 23/00076-2 | TBF Tvøroyrar borðtennisfelag -stuðul ísamb. við 75 ára stovningardag |
| 22/23 | 21/00687-5 | Tilmælið um keyp av brúktum vørubili til skaðadjórstýning |
| 23/23 | 23/00077-2 | Staðseting av fongsul -fyrisp. frá Løgmálaráðnum |
| 24/23 | 23/00117-2 | RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2023 |
| 25/23 | 23/00078-4 | **LUKKA MÁL:** |
| 26/23 | 23/00110-2 | **LUKKA MÁL:** |
| 27/23 | 22/00388-1 | **LUKKA MÁL:** |

| | | |
|---|---|---|
| **Til kunningar** | | |
| 5/23 | 21/00536-2 | GIGNI -Heilsufrøðingur í farloyvið ( ) |
| 6/23 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |
| 7/23 | 23/00113-3 | KF Kommunufelagið -aðalfundur 2023 |
| 8/23 | 23/00114-2 | "Fólk undir Heygnum" -skriv sent til Kirkjuráðið |

Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Súsanna Bertholdsen hevur fráboðað forfall til býráðsfundin, og at Susánna Bertholdsen somuleiðis hevur fráboða, at hon ynskir at varalimur á list C, Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 møtir fyri seg til býráðsfundin 30 mars 2023.

Fyrst (1) valdi varalimurin á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020, ið er Eyð Eidesgaard hevur boða frá, at hon kann ikki møta til býráðsfundin.

Næst (2) valdi varalimurin á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020, ið er Jens Arni Hammerfoss Leo, hevur fráboða, at hann ikki kann møta til býráðsfundin.

Triði (3) valdur varalimur á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020, ið er Signar Dam hevur fráboða, at hann kann møta fyri Súsannu Bertholdsen til býráðsfundin 30. Mars 2023.

Atkvøtt verður um, hvørt Signar Dam kann taka sæti í býráðnum 30. mars 2023. –Einmælt samtykt

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur síðani skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa? –ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 19/23
## 22/00199-4 SALT -Val av stýrislimi í Saltsilogrunnin 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 94/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 102/22 |
| 3 Býráðið | 24.10.2022 | 62/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 19/23 |

**Málslýsing: kommunustjórin 15.10.2022**
Vísandi til viðtøkurnar fyri Saltsilogrunnin, skal Tvøroyrar kommuna velja ein stýrislim, ið situr í 4 ár.

Tvøroyrar býráð valdi umboði Charlotta Nielsen, at avloysa Desiree Mortensen í aug. 2020, sum ynsktið at siga nevndarsessin upp í úrtíð. Við tað at valskeiði byrjaði 14. Juni 2018 hjá liminum hjá Tvøroyrar kommunu, og hesin kann sita í 4 ár, skal støða takast til, hvussu framhaldið skal vera av nevndarsessinum eftir 1. Januar 2023.

Vísandi til at nevndin fyri Saltsilogrunnin hevur hin 15. Mars 2022 heitta á Uttanríkis og mentamálaráðið um at víðkað um nevndina í Saltsilogrunninum, frá verandi 3 limum til 5 limir, har Tvøroyrar kommuna kemur at hava ein fastan lim, mælir umsitingin til, at Tvøroyrar býráð fylgir áheitanina hjá Saltsilogrunninnum frá 15. Mars 2022, og velur ein nevndarlim at umboða Tvøroyrar kommunu í Saltsilogrunninum, eisini eftir 1. Januar 2023.

**Lógargrundarlag:** Kommunusfulltrúin, Viðtøkur fyri Saltsilogrunnin

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Mentanarnevndin 18. oktober 2022:</u>**
Einmælt samtykt at Charlotta Nielsen heldur fram sum nevndar limur umboðandi Tvøroyrar kommunu.

**<u>Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini 18. oktober 2022.
Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt at velja Charlottu Nielsen í stýrið fyri Saltsilogrunnin.

**Kommunustjórin 12. Mars 2023:**
Umsitingin hevur móttikið teldupost 11.03.2023 frá stjóranum í Saltsilogrunninum, við kunning og áheitan um at:

> *"Undirritaði hevur í maili frá Almanna- og Mentamálaráðnum tann 9. mars 2023 fingið heimild til at boða ymisku pørtunum frá, at veljast skulu nevndarlimir til Saltsilogrunnin, nú viðtøkurnar eru broyttar, soleiðis at fimm limir manna nevndina, og ikki sum áður tríggir.*
>
> *Vísandi til mail frá tær tann 27. okt. 2022 loyvi eg mær hervið at heita á Tvøroyrar kommununu, at útnevna ein nevndarlim í Saltsilogrunnin, at taka við sum skjótast. Nevndarskeiðið er frá t.d. 1. apríl 2023 (velst um nær útnevningarnar eru uppá pláss) og fýra ár fram.*
>
> *Charlotta Nielsen er vald sum er, og kann endurveljast.*
>
> *Ólavur Rasmussen, stjóri"*

Umsitingin hevur framanundan hetta mótikið teldupost hin 26.02.2023 frá stjóranum í Saltsilogrunninum við kunning um, at viðtøkubroytingarnar eru komnar so mikið langt, at Føroya landsstýri hevur sagt seg góðkenna tær, soleiðis at nevndin fyri Saltsilogrunnin verður víðkað úr trimum til fimm limir.

Framyvir, galdandi frá t.d. 1. apríl 2023 og fýra ár framm, verður nevndin soleiðis vald:
Landsstýrið ein lim, Tvøroyrar kommuna ein lim, LISA ein lim, Filmsfelagið ein lim og Felagið Føroysk Tónaskøld og Føroya Tónleikarafelag ein lim.

Borgarstjórin mælir til, at Charlotta Nielsen heldur áfram og verður afturvald sum nevndarlimur umboðandi Tvøroyrar Kommunu í Saltsilogrunnin nevndarskeiðið 1. Apríl 2023 til 31. Mars 2026, samb. galdandi viðtøkum fyri Saltsilogrunnin.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá borgarstjóranum, at velja Charlotta Nielsen sum umboð fyri Tvøroyrar Kommunu í Saltsilogrunnin nevndarskeiðið 1. Apríl 2023 til 31. Mars 2026, samb. galdandi viðtøkum fyri Saltsilogrunnin.

**20/23**
**23/00079-1 Kommunusamanlegging -arbeiðsbólkurin**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 19/23 |
| 2 Býráðið | 30.03.2023 | 20/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.02.2023**
Arbeiðsbólkurin, ið umboðar tær tríggjar kommunurnar í Suðuroynni Hvalba, Fámjin og Tvøroyri, sum hava samtykt at kanna fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni, hevði fyrsta fundin í býráðssalinum á Tvøroyri 2. mars 2023, og tey 6 valdu umboðini í arbeiðsbólkinum skipaði seg soleiðis:

- Róin Schrøder, form. *–valdur í arbeiðsbólkin av Hvalbiar bygdaráð*
- Doris Bjarkhamar, næstforkv. *–vald í arbeiðsbólkin av Tvøroyrar býráð*
- Ólavur Rasmussen, skrivari. *–valdur í arbeiðsbólkin av Hvalbiar bygdaráð*
- Eyðdis Ellendersen, nevndarlimur. *–vald í arbeiðsbólkin av Fámjins bygdaráð*
- Herit Albinus, nevndarlimur *–vald í arbeiðsbólkin av Tvøroyrar býráð*
- Niels Jákup Trúgvason Nielsen, nevndarlimur. *–valdur í arbeiðsbólkin av Fámjins bygdaráð*

**Tilgongdin til arbeiðsbólkin:**

**Tvøroyrar Kommuna**
Tvøroyrar býráðið hevur á fundi 6. september 2022 einmælt samtykt, at heimila Kristin Michelsen, borgarstjóra at taka stig til, at Tvøroyrar býráð heitur á hvørja einstøku kommunu í Suðuroynni um at velja limir í ein arbeiðsbólk, at viðgerða sjálvbodna kommunusamanlegging í Suðuroynni, og at geva borgarstjóranum heimild at hava fund við allar borgarstjórar í Suðuroynni at viðgerða uppskotið at velja limir í arbeiðsbólk, við uppskot til arbeiðssetning:

- *at hesin fremur eina lýsing av hvørjari kommunu sær av fyrimunum og vansum við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni, og at arbeiðsbólkurin orðar eina niðurstøðu, ið verður løgd til støðutakan hjá hvørjari kommunu sær innan 31.12.2023"*

**Fundur á Hamragarði 21. Sep. 2022 har allir borgarstjórar luttóku:**
Tilmælið og samtyktin á fundinum á Hamragarði hin 21. September 2022, kl. 18.30, har allir borgarstjórar og kommunuskrivarar vóru møttir, var:

- Full semja var millum allar borgarstjórar, at hesir hvør í sær leggja uppskotið fyri teirra kommunustýrið, hvørt kommunan ynskir at vera umboðað í arbeiðsbólkinum, ið skal lýsa fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging í Suðuroynna.

- Og um kommunustýrið tekur undir við uppskotinum, velur hvørt kommunustýrið sær eitt umboð í arbeiðsbólkin, sum fær til uppgávu at lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging.

- Kristin Michelsen mælti til, at raksturin av arbeiðsbólkinum verður fíggjaður eftir sama býtislyklið, sum er galdandi fyri BHS. Hetta var breið semja um, treyta av at kommunustýrið samtykti uppskotið.

**Eftirfylgjandi viðgerð av uppskotinum í hvørjari kommunu sær:**

**Hvalbiar Kommuna**

Hvalbiar kommuna hevur á bygdaráðsfundi 24.10.2022, einmælt samtykt at velja lim í arbeiðsbólk at kanna fyrimunir og vansar við uppskoti um sjálvbodna kommunusamanlegging.

**Fámjins Kommuna**

Fámjins kommuna hevur einmælt samtykt at velja fólk í samstarvsbólk at arbeiða við sjálvboðnari kommunusamanlegging í Suðuroynni.

**Vágs Kommuna**

Vágs Býráð hevur á fundi 26. september viðgjørt áheitanina frá Tvøroyrar kommunu. Vágs Býráð heldur, at hetta er alt og ógreitt, at taka støðu til. Vágs Býráð ynskir at borgarstjórarnir seta seg saman, at gera ein arbeiðssetning fyri arbeiðsbólkin.

**Sumbiar Kommuna**

Sumbiar kommuna hevði hesa áheitan fyri á fundi tann 02.10.2022. Og var einmælt samtykt, at útseta hettar mál, tí kommunustýrið meinar, at her er nógv sum er sera ógreitt.

**Porkeris Kommuna**

Á bygdarráðsfundi 24 oktober 2022 bleiv kunnað um uppskot um kommunusamanlegging í Suðuroy. Bygdarráðið metti á fundinum at málið ikki var búgvi til støðutakan, grunda á at ov fáir upplýsingar eru hesum viðvíkjandi.

**Hovs Kommuna**

Kommunustjórin hjá Tvøroyrar Kommunu hevur 20.12.2022 tosa við borgarstjóran í Hovi, sum upplýsir at kommunustýrið hevur umrøtt málið beint eftir fundin á Hamragarði, men enn ikki tikið endaliga støðu. Upplýst var, at bygdaráðið møguliga hevur ein fund seint í desember í ár, har málið møguliga verður viðgjørt.

**Tvøroyrar Kommuna**

Tvøroyrar býráð hevur á býráðsfundi 29. des. 2022 aftur málið á skrá, eftir at allar kommunurnar í Suðuroynni hava viðgjørt uppskotið um at velja lim í arbeiðsbólk at lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni. Fyri at málið ikki skal steðgað upp, og fyri at koma víðari við ætlanina hjá teimum kommununum sum hava samtykt, at velja limir í arbeiðsbólkin, bleiv einmælt samtykt av Tvøroyrar býráð at:

- *at býráðið á Tvøroyri á fyrst komandi býráðsfundi, velur 2 limir í arbeiðsbólkin at lýsa fyrimunir og vansar við kommunu samanlegging.*
- *at mæla Hvalbiar Kommuna og Fámjins kommuna at velja 2 limir hvør í arbeiðsbólkin, ið fer til verka fyrst í komandi árið 2023.*
- *at heita á Hovs Kommunu, um at taka endaliga støðu við tilmælið um at velja 2 limir í arbeiðsbólkin.*

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018
- Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur

**Fíggjarligar avleiðingar:** Kostnaðurin verður áleið 500tkr. Ongin ávís játtan er avsett á FÆ2023, og verður mælt til at veita eykajáttan. Mælt verður til býtislykil eftir fólkatalinum pr. jan. 2023, og at Tvøroyrar Kommuna í fyrsta umfari leggur út fyri arbeiðsbólkin, og at innheintingin verður at fara fram umvegis BSL.

| TVK | HVK | FAK | |
|---|---|---|---|
| 1774 | 666 | 79 | Fólk pr. 1.1.2023 |
| 70,42 | 26,44 | 3,14 | % |
| 352.000,- | 132.000,- | 15.000,- | ~ 500.000,- |

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 23. marts 2023:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá at veita samsýning samb. uppskot hjá arbeiðsbólkinum. Málið verður beint í býráði.

**<u>Býráðið 30. marts 2023:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og játtanin verður veitt sum eykajáttan av innistandandi.

**21/23**
**23/00076-2 TBF Tvøroyrar borðtennisfelag -stuðul ísamb. við 75 ára stovningardag**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.03.2023 | 22/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 17/23 |
| 3 Býráðið | 30.03.2023 | 21/23 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 27.02.2023
Borgarstjórin hevur fráboða, at í samband við at Tvøroyrar Borðtennisfelag fylti 75 ár 23 februar 2023 hevur hann tikið stig til stuðla felagnum við kr. 75.000,-.

Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin og Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018

**Lógargrundalag:**
*(Kommunustýrislógin) § 21. Stk. 3. Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023, 524, avsett eru 2.3mió.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 16. marts 2023:**
Einmælt samtykt at lata kr. 75.000,- í stuðul. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**22/23**
**21/00687-5 Tilmælið um keyp av brúktum vørubili til skaðadjórstýning**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 20.03.2023 | 22/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 21/23 |
| 3 Býráðið | 30.03.2023 | 22/23 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur móttikið tilboð um keyp av 2 ára gomlum vørubili, ið sýnist at hóska væl til tørvin og arbeiðsøkið hjá starvsfólkinum á teknisku deild, ið fáast við at týna skaðadjór. Verandi arbeiðsbilur er meira enn 15 ár og er í sera ringum standi, at hesin ikki gongur til sýn.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Kostnaðurin er kr. 60.000,- ongin játtan avsett á FÆ 2023, mælt verður til, at fíggja keyp við flytan millum rakstarstøð ella við eykajáttan.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið tekniskunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 20. marts 2023:**
Mælt verður til at keypa bilin, og at finna fígging til tað.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku nevnd

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið og fígging fæst við flytan av játtan av rakstur innan §6 tekniska økið.

**<u>23/23</u>**

## <u>23/00077-2 Staðseting av fongsul -fyrisp. frá Løgmálaráðnum</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2023 | 23/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.03.2023**
Umsitingin hevur móttikið fyrisp. frá Løgmálaráðnum, ið hevur sent áheitan til allar kommunur í Føroyum, um at vísa á hóskandi staðseting av einum føroyskum fongsul, ið SVM-stjórnin hevur í sínum samgonguskjali frá desember 2022 staðfest, at danska stjórnin fer at arbeiða fyri, at nýggja føroyska fongslið verður liðugt í 2029, t.v.s. eitt ár fyrri enn sambært ætlanaryvirlýsingini. Við nýggja fongslinum kann væntast, at so at siga allir føroyingar, ið verða dømdir fongsulsrevsing, kunna sita revsingina í Føroyum.

**<u>Løgmálaráðið (Løgmaður) kunnar um at:</u>**

- Sum tað allarfyrsta mugu danska stjórnin og Føroya landsstýrið tó koma ásamt um staðsetingina av nýggja fongslinum.

- Danska kriminalforsorgin hevur í hesum sambandi gjørt eina kravfesting, sum møguligar staðsetingar mugu lúka. Til dømis er tað eitt krav, at byggiøkið í minsta lagi er 40 til 80 túsund kvadratmetrar til víddar. Eisini eru onnur staðfrøðilig krøv til økið, umframt krøv til veðurlagið í økinum, fjarstøða til bygt økið, almennar flutningstænastur v.m.

- Kommunurnar koma við uppskotum Eg (løgm.) haldi, at tað eru kommunurnar sjálvar, sum kenna best til lendið í teimum einstøku kommununum kring landið. Tí eru tað eisini kommunurnar, sum best kunnu meta um, hvørji økir lúka treytirnar í kravfestingini frá danska løgmálaráðnum. Eg haldi tað tí vera skynsamt at geva kommununum møguleika at koma við uppskotum til, hvar nýggja fongslið skal staðsetast. Eg fari tí vinaliga at heita á allar kommunur í landinum um at kanna og koma við uppskotum til økir, sum lúka donsku kravfestingina, og sum kommunurnar meta høvdu hóskað seg til eitt fongsul. Eg fari at heita á kommunurnar um at senda Løgmálaráðnum sítt ella síni uppskot í seinasti lagi tann 1. juni 2023. Føroya landsstýri fer síðani, við støði í uppskotunum frá kommununum, at koma við uppskotum til ríkismyndugleikarnar um, hvar nýggja fongslið kann byggjast. Tað eru tó ríkismyndugleikarnir, sum taka endaliga avgerð um staðsetingina av fongslinum. Løgmálaráðið fer í næstum at skipa fyri einum fundi fyri áhugaðum kommunum, har greitt verður frá ætlanini at byggja nýtt fongsul í Føroyum, og hvussu mannagongdin fer at vera.

Fundur var í Tinganesi hin 14. Mars, har allar kommur vóru bodnar at møta. Tvøroyrar kommuna var umboða av borgarstjóranum, kommunustjóranum og Lassa Jensen virkandi tekniskur leiðara. Har fingu kommunurnar at vita, at tíðarfreistin var 1 juni at koma við uppskotið til staðseting.

Til støðutakan hjá Tvøroyrar býráð er uppskot frá borgarstjóranum, hvørt Tvøroyrar Kommuna skal arbeiða víðari við uppskoti um at ætlanin hjá donsku stjórini at staðseta eitt føroyskt fongsul, at henda staðseting kann verða í Tvøroyrar Kommunu.

**Meira kunning er í bilag frá Kriminalforsorgen**

*<u>Geografisk placering</u>*
Kriminalforsorgen finder det hensigtsmæssigt, såfremt placeringen af en ny institution sker inden for en tidsmæssig rimelig afstand fra Tórshavn, og at der er adgang til offentlig transport. Sidstnævnte såvel af hensyn til personalet som besøgende. Desuden fremgår det, at institutionen ikke bør placeres et sted, som er *særlig* udsat i forhold til de vejrmæssige forhold på Færøerne. Netop de vejrmæssige forhold har skabt udfordringer i den eksisterende institution i Mjørkedal.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt, at heimila borgarstjóranum og umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini.

**24/23**
**23/00117-2 RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2023 | 24/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.03.2022**
Við hesum verður boðað limunum í Ráðnum fyri Ferðslutrygd frá, at ársfundur verður fríggjadagin hin 28. apríl 2023 í Auditorinum í Smæruni, J. H. Schrøtersgøtu 7 í Havn frá kl. 09.30 til kl 14.00.

Heitt verður á limirnar at boða frá, hvør møtir teirra vegna á ársfundinum í seinasta lagi týsdagin 18. apríl kl 12.00

**Lógargrundarlag:**

*- Formaðurin kallar inn við 30 daga freist (§5)*
*- Uppskot til viðgerðar á ársfundinum skulu verða formanninum skrivliga í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri ársfundin og verða send limunum 7 dagar fyri fundin. (§6)*
*- Til ársfundin sendir hvør limur eitt umboð, sum hevur heimild at taka støðu vegna limin. (§4)*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt at Bjarni Hammer umboðar Tvøroyrar Kommunu.

**25/23**
**23/00078-4 LUKKA**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.03.2023 | 26/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 18/23 |
| 3 Býráðið | 30.03.2023 | 25/23 |

**26/23**
**23/00110-2 LUKKA:**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 22/23 |
| 2 Býráðið | 30.03.2023 | 26/23 |

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**27/23**
**22/00388-1 LUKKA**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 87/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 16.03.2023 | 24/23 |
| 3 Býráðið | 30.03.2023 | 27/23 |

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Til kunningar**

## 5/23
## 21/00536-2 GIGNI -Heilsufrøðingur í farloyvið ( )

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 20.08.2021 | 6/21 |
| 2 Sosiala nevnd | 13.02.2023 | 3/23 |
| 3 Sosiala nevnd | 23.03.2023 | 3/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 5/23 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá við fráboðan um, at hon er farin í 1 ára farloyvið úr starvinum sum Heilsufrøðingur.

**Sosiala nevnd 20. august 2021:**
Kunna

**Kommunustjórin 02.02.2023**
Sum kunna um omanfyri, hevur fingið játta farloyvið úr starvi sínum sum Heilsufrøðingur í Suðuroynni.

Kommunustjórin hevur d.d. tosa við leiðsluskrivaran á GIGNI, sum upplýsir, at farloyvið hjá er longt við einum ári, tvs. til endan av skúlaárinum 2023. Avloysari – - var inni fyri Karin Strøm í skúlaarinum 2021/2022, meðan ongin avloysari hevur verði 2022/2023.

Gigni upplýsir, at søkt hevur verði eftir avloysara, men ongin hevur søkt starvið. Tó hevur tað eydnast at fáa ein heilsufrøðing úr Danmark, ið eitur , ið kemur at arbeiða sum heilsufrøðingur í Suðri frá viku 5 til viku 10 í 2023.

kemur í nevnda tíðarskeiði at gera allar útskúlakanningarnar í 9. flokki og eisini at undirvísa 9. flokkunum um seksualitet. kemur eisini at gera aðrar átrokandi samrøður og kanningar, sum skúlin metur eru neyðugar.

**Sosiala nevnd 13. februar 2023:**
Sosialanevnd ynskir at gera vart við, at støðan ikki er nøktandi. Mælt verður til at umsitingin heitur á GIGNA um at fáa eina varðandi loysn fyri Suðuroynna. Tað verður ikki mett nøktandi, at bert børn í 9 flokki fáa møguleika at møta heilsufrøðingi.

**Sosiala nevnd 23. marts 2023:**
Málið var kunna.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunna.

**6/23**
**23/00044-1 Skattatøl 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 4/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 6/23 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 01.02.2023
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2022/2023

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**7/23**
**23/00113-3 KF Kommunufelagið -aðalfundur 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2023 | 7/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 26.03.2023**
KF Kommunufelagið hevur aðalfund 21. Apríl 2023 á Hotel Føroyum, har allir býráðslimir eru boðin við.

**Lógargrundarlag: -**

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til kunning.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var kunna.

**8/23**
**23/00114-2 "Fólk undir Heygnum" -skriv sent til Kirkjuráðið**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2023 | 8/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27.03.2023**
Umsitingin hevur hin 27.03.2023 móttikið teldupost frá avsendar, ið nevnist "Fólk undir Heygnum", og sum undirskriva seg sum "*fólk í grannalagnum og limir í fólkakirkjuni annars*". Bólkurin upplýsir at skriv er til Tvøroyrar kirkjuráð tann 20. februar 2023. *"Við áheitanini um, at vísa misnøgd við ætlaðu staðsetingina av mjølverksmiðjuni hjá Varðanum Pelagic"*

**Viðmerkingar hjá umsitingini eru:**
- d.d. fyriliggur onki svar frá Tvøroyrar Kirkjuráð
- Tvøroyrar kommuna er ikki liðug at viðgerða ítøkuligu umsóknina frá P/F Varðin Pelagic um byggiloyvið. Men Tvøroyrar býráð hevur samtykt at byrja uppá tilgongd at broyta byggisamtyktina fyri økið, har P/F Varðin Pelagic hevur søkt um loyvið at byggja Protein og lýsiverksmiðju. Broyting av byggisamtyktunum er ein fyritreyt fyri at byggiumsóknin ítøkuliga kann viðgerðast og eitt evt. byggiloyvi kann útvegast.

**Málsgongdin er henda:**
Tvøroyrar Kommuna hevur hin 29.12.2023 frá P/F varðin Pelagic móttikið umsókn um byggiloyvið til protein og lýsiverksmiju á Tvøroyri, har fyritøkan P/F Varðin Pelagic ynskir at byggja uppí verandi virkisbygning, ið er staðsettur á matr.nr 493a. Tvøroyrar kommuna hevur viðgjørt umsóknina frá P/F Varðin Pelagic um byggiloyvið til lýsi og proteinverksmiðu samsvarandi niðanfyri tilmælið hjá teknisku umsiting.

**Málslýsing: Kommunustjórin 03.01.2023**
Kristin Michelsen, borgarstjóri hevur hin 29.12.2022 móttikið umsókn um byggiloyvið frá Boga Jacobsen, forstjóra í P/F Varðin og stjóra í P/F Varðin Pelagic til bygging av Protein- & Lýsiverksmiði.

Borgarstjórin hevur í hesum sambandi heitt á stjóran í P/F Varðin Pelagic um at kunna býráðið og umsitingina meira um verkætlanina, áðrenn ætlaða borgarafundin tann 24. Januar 2023.

**Býráðið 03. januar 2023:**
Borgarstjórin kunnar um, at leiðslan hjá P/F Varðin Pelagic hevur fráboða, at býráðslimir og umsitingin hjá Tvøroyrar Kommunu kunna fáa kunning frá framleiðaranum av útgerðini -Haarslev Processing Technology- í Søndersø á Fyn, í viku 3. Eisini leggur leiðslan á P/F Varðin Pelagic upp til, at vitja verður á líknandi verksmiðjum, ið hevur somu útgerð, sum ætlanin er at uppseta á Tvøroyri.

Borgarstjórin mælir til, at umsitingin og býráðið vitja framleiðara av útgerð hjá P/F Varðin Pelagic og vitjar verksmiður, ið hava líknandi útgerð, sum ætlanin er at uppseta á Tvøroyri. **Einmælt samtykt.**

Borgarstjórin mælir til at fíggingin til ferðina verður játta av FÆ2022, §118 Tekniskaøkið, §114 Samsýnig til kommunustýrislimir, §114 fyrisiting. **Einmælt samtykt.**

Borgarstjórin mælir til at borgarafundur verður týsdagin 24. Januar 2023. **Einmælt samtykt.**

- Tvøroyrar kommuna skipar fyri ransóknarferð fyri býráðslimir og starvsfólk úr umsitingini í døgunum 15. jan- 20. jan. Hetta fyri at fáa meira innlit, vitan og blíva betri ílatin at taka avgerð í umsóknini frá P/F Varðin Pelagic at byggja lýsi og protein verksmiðu á Tvøroyri.

- Tvøroyrar Kommuna skipar fyri borgarafundi í SALT 24. januar 2023, um ætlanirnar hjá Varðanum Pelagic at byggja protein og lýsiverksmiðju á havnarlagnum á Tvøroyri. Borgarar í Tvøroyrar Kommunu fáa møguleika at koma til orðanna, har borgarar í Tvøroyrar kommunu, fáa møguleika at hava eina framløgu, ella at halda eina røðu fyri áhoyrarunum um verkætlanina. Umframt omanfyri nevnda møguleika, verður sjálvsagt eisini møguligt hjá borgarum í Tvøroyrar kommunu, at seta spurningar til panellutakararnar á borgarafundinum. Fjølmiðlar eru vælkomnir at vera til staðar á borgarafundinum. Loyvt verður tó ikki at banda, ella senda beinleiðis frá orðaskiftinum og framløgunum. Samrøður kunnu gerast áðrenn og/ella aftan á borgarafundin.

Í panelinum sita: Hans Haraldsen, VERKFO, Torben Preitz, Haarslev, Birgir Finnbogason, Haarslev, Torsten Ostenfelt, Niras, Knut Wiik, Purenviro, Helge Korsager, Johannes Steingrund, Steingrund Akustik, John Ellingsgaard, Jysk Skorstensservice, Svend Sivertsen, FUGLARK, Eyð Eidesgaard, Varðin Pelagic, Ólavur Bjarkhamar, Varðin Pelagic, Bogi Jacobsen, Varðin Pelagic.

Tvøroyrar kommuna er umboða av borgarstjóranum, vara borgarstjóranum, kommunustjóranumog ráðgevandi løgfrøðinginum hjá Tvøroyrar kommunu, ið svara uppá spurningar frá borgarum o.ø.

---

**Teknisku umsitingin -málslýsing og tilmælið til býráðsfund 26.01.2023:**

Umsókn er komin frá P/F Varðin Pelagic, sum ikki er innan fyri karmarnar av verandi byggisamtykt galdandi fyri Tvøroyrar Kommunu. Mælt verður býráðnum til at taka støðu til umsóknina, hvørt umsitingin skal:

1. Gera uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri økið eystan fyri verandi matr.nr 493a, har virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur.
2. Loyva útfylling á sjógv eystan fyri verandi matr.nr 493a, har verandi virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur, har útfylta økið kann verða nýtt til staðseting av protein og lýsuverksmiðju hjá P/F Varðin Pelagic.

**Býráðið 26. januar 2023:**

Borgarstjórin mælir til at málið verður beint í Vinnu og havnanevndina. Einmælt samtykt.

**Tekniska umsiting 13-02-2023:**

Eftir áheitan frá býráðnum, 26. januar 2023, verður Vinnu- og havnanevndin biðin um at taka støðu til, hvørt umsitingin skal gera uppskot til byggisamtykt fyri økið (herundir sjóøkið) eystan fyri verandi matr.nr 493a, har virkisbygningurin hjá Varðin Pelagic er staðsettur.

**Vinnu- og havnanevndin 15. februar 2023:**

Samtykt at heita á umsitingina at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, við korti, at leggja fyri býráðið. Talan er um at víðka Havnarøki D uml. 100m eystureftir, og at samstundis at broyta Neystaøki G, ið liggur innanfyri, til Havnarøki.

**Tekniska nevnd 15. februar 2023:**

Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Vinnu-og havnanevndini. Umsitingin ger uppskot til broyting av byggisamtyktini, og tað verður lagt fyri býráðið.

**Tilmælið frá teknisku umsitingin til býráði 20. feb. 2023.**
Uppskot til broyting av byggisamtykt og viðkan av havnarlagnum.
*(Í samráð við ráðgevandi verkfrøðingar MELCON)*

Eftir áheitan frá Vinnu- og havnarnevndini,15-02-2023, og Tekniska nevnd, 15-02-2023, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri Tvøroyrar kommunu soleiðis, at Havnarøki "D" verður víðkað 100 m eystureftir, har uml. 8422 m2 er uppfylt sjóøki, 1919 m2 verður broytt frá neystaøki "G", og uml. 233 m2 verður broytt frá miðstaðarøki "A". Sí viðhefta kort-tilfar, umframt yvirlit yvir matr. nr., ið verða umfatað av broytingini.

Eisini verður mælt til, at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini soleiðis, at §29 Øki D: Havnarøki, stk. 4, verður orðað soleiðis: "Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir, herundir siloir og skorsteinar, vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins."

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. februar 2023:**
Nevndin varð kunnað um ætlanina.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Súsanna Bertholdsen mælir til, at støða verður ikki tikin til málið at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, fyrr enn býráðið hevur havt fund við bólkin «Livilig Kor á Tvøroyri», sum hevur biði um fund við býráðið.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen.
Fyri eru: Súsanna Bertholdsen
Ímóti eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg Jespersen Bech Atkvøtt blank: Bjarni Hammer og Kristina Roest
Tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen er harvið ikki samtykt.

Atkvøtt var um tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Kristina Roest
Ímóti eru: ongin
Atkvøtt blankt: Súsanna Bertholdsen
Tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini og Teknisku nevnd er harvið samtykt

**Býráðið 20. februar 2023:**
Atkvøtt var um tilmælið hjá teknisku umsitingini.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Kristina Roest
Atkvøtt ímóti eru: ongin
Atkvøtt blankt: Súsanna Bertholdsen
Tilmælið hjá teknisku umsitingini er harvið samtykt

---

**Kunngerð um broyting av byggisamtykt við tilhoyrandi skjølum og korttilfari hevur ligið frami alment á býráðsskrivstovuni á Tvøroyri, Tvørávegi 37, síðani 23. februar 2023, har m.a verður kunna um at: "Møgulig mótmæli móti uppskotinum og møgulig broytingaruppskot mugu verða kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 10. apríl 2023. kl. 15.00"**

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:20

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Signar Dam